# Fundarfrágreiðing Lestrarráðið 23.05.2018

**Møtt:** Durita, May-Britt, Annemi, Marin,  Amanda, Karin Elisa, Liljan

**Ikki møtt:** Daniella, Ragnhild, Maria

**Dagsskrá:**

1) Góðkenning av fundarskrá

2) Góðkenning av seinastu fundarfrásøgn (sí viðfesti)

3) Flyting í Sjólon – hvussu uppliva lesandi hetta? Lesandi eru vælkomin við ymskjum/uppskotum

4) Lestrarumboð hjá lesandi komandi skúlaár. Umframt at fáa umboð eisini frá master í lestrarráðið

5) Viðgera fylgjandi: Tulking av áseting í Kunngerð um útbúgving til sjúkrarøktarfrøðing: *Stk. 3*. Lesandi skal hava **luttikið** í øllum uppgávum, royndum og próvtøkum, sum liggja frammanundan uttanseturs próvtøku, áðrenn próvtøkan kann avgreiðast.

6) Ymiskt

- Undirvísing byrjar kl 09 eftir summarferiuna

- Tilboð frá Rit og Rák um at keypa bøkur, so tær liggja klárar tá eindir byrja

GG.: Ongar góðskrivingar at viðgera hesaferð. Umleið 20 eru longu avgreiddar millum útbúgvingarleiðara og lestrarforkvinnuna, av tí at hesar máttu avgreiðast innan lestrarbyrjan fyrst í apríl 2018.

| Evni | Viðmerkingar | Niðurstøða |
|---|---|---|
| **AD1:** Góðkenning av fundarskrá | | Fundarskráin góðkend |
| **AD2:** Góðkenning av seinastu fundarfrásøgn (sí viðfesti) | | Fundarfrásøgnin góðkend |
| **AD3:** Flyting í Sjólon – hvussu uppliva lesandi hetta? Lesandi eru vælkomin við ymskjum/uppskotum | Lestrarumboðið fyri tey lesandi hava skriva út á Facebook bólkin, fyri at vita um lesandi eru glað fyri at flyta yvir í Sjóvinnuhúsið | Lesandi ynskja atgongd til køk, so tey kunnu gera sær kaffe og te og hita sær mat<br><br>Inniklimaðið er gott samanborið við Jónas Broncks, men hoyri-viðurskiftini er ikki so góð hjá teimum, sum sita aftast<br><br>Lesandi eru væl nøgd við parkeringsviðurskiftini her. |

| | | |
|---|---|---|
| | | Í samband við flytingina halda lesandi, at tey mangladu at fáa meira kunning viðv. flytingina<br><br>Lesandi eru væl nøgd sum heild.<br><br>May-Britt kannar hvønn køk lesandi kunnu brúka um tað er tann á 2 ella 4 hædd.<br><br>Felagstími fyri lesandi á Heilsu-og Sjúkrarøktarvísindi verður 20 august 2018, frá kl 11 til 12<br><br>Gera okkurt felagstiltak fyri lesandi á HSV og NVD, tá tey byrja aftur í august.<br>Tað verður eitt alment opið hús 13 juni. |
| **AD4:**<br>Lestrarumboð hjá lesandi komandi skúlaár.<br>Umframt at fáa umboð eisini frá master í lestrarráðið | Lesandi halda at tað er gott at verða við í lestrarráðnum og at tey kunna hava eina ávirkan á útbúgvingina.<br><br>Tað skal eisini verða Lestrarumboð fyri master lesandi í lestrarráðinum.<br><br>Men tað skal verða tann parturin av master sum koyrir sum útbúgving, sum kunnu sita í ráðnum | Umboð fyri lesandi til lestrarráðið komandi skúlaár verður valt av nýggjum, tá skúlaárið byrjar. Tað ber eisini til hjá teimum, sum hava siti í lestrarráðinum, at sita víðari um tey ynskja tað og um flokkurin ynskir tað.<br><br>Dato fyri komandi lestrarráðsfundir koma eftir skúlabyrjan, men væntandi verður fyrsti fundurin mitt í sep. |
| **AD5:**<br>Viðgera fylgjandi: Tulking av áseting i kunngerð um útbúgving til sjúkrarøktarfrøðing: Stk.3. Lesandi skal hava luttikið í øllum uppgávum, royndum og próvtøkum, sum liggja frammanundan uttansetturs próvtøku, áðrenn próvtøkan kann avgreiðast | Hvat merkir at luttaka, er tað tá man letur uppgávur, royndir og próvtøkur inn, ella er tað at luttaka í undirvísing | Kunngerðarbólkurin fer at hyggja eftir hesari kunngerð og tey fara at definera hvat **Luttaka merkir** |
| **AD6:**<br>Ymiskt | Avtala gerast við Rit og Rák um at bíleggja bøkur til lesandi, við at | Vit siga ja takk til at tey bíleggja bøkurnar til lesandi |

| | | |
|---|---|---|
| | bókmentalistin og tal av lesandi verðursent Rik og Rák seinast tríggjar vikur innan eindirnar byrja.<br>Prísurin er tann sami sum Saxo og H.N.J Bókhandil | |
| Undirvísing byrjar kl 09 eftir summarferiuna | | |
| **Næsti fundur** | | September 2018 kl 9-11 |
| | | |
| | | |
| | | |

Ref: Liljan Witt